# Satsar nú eisini í Asia

**Fyritøkan Injector Trawldoor A/S framleiðir trollemmar og hevur nú eisini framleiðslu í Kina og satsað verður nú eisini í Asia, umframt á europeiska marknaðinum. – Framleiðslan í Kina gevur kappingarførar prísir, sigur Jan Allan Müller, stjóri**




*Mynd av stjóranum hjá kappingarneytanum hjá Injector í Asia, Baykuyng Trawldoors Ltd. Injector og Baukuyng hava gjørt søluavtalu um Injector trollemmar í Suður Korea, har Baykyung selur og Injector Asia Ltd. í Kina framleiðir. Stjórin eitur Kim Seong Hong og kona hansara er á myndini eins og Jan Allan Müller, stjóri í Injector Trawldoors*



*Eitt stórt sett 15 m² Scorpion til Norra og eitt sett 3,6 m² Injector Scorpion til Grønlands*

**ÚTGERÐ**

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Í Horsens liggur Injector Trawldoor A/S, ið framleiðir ymisk snið av trollemmum. Sjálv framleiðslan liggur Esbjerg, Litava og Kina.

– Vit hava framleiðslu í Kina í bygdini Guang Zhou í landslutinum Quang Dong.

– Vit framleiða mest við marknaðinum í Asia í huga, men hugsa tó eisini um Europa. Vit royna at dyrka henda marknaðin í Asia, og framleiðslan í Kina gevur kappingarførar prísir, tí hon er bílig, greiður Jan Allan Müller, stjóri. frá.

Injector fer í august í ár at lata upp søluskrivstovu í Suður Korea, so lættari er at røkka marknaðunum har á leið, og har snýr tað seg um lond, ið hava stórar skipaflotar.

## Ordri fyri 4 milliónir

- Vit hava, umframt í Kina1, eisini framleiðslu í Litava og í Esbjerg og í Esbjerg hava vit gjørt samstarvsavtalu við kappingarneytan, sigur Jan Allan Muller, sum fegnast um ein ordra, sum kom innn fyrradagin, og er áljóðandi 20 sett av lemmum, ið eru 7,5 fermetrar og viga 2500 kilo stykki.

- Hetta er ein stórur ordi áljóðandi einar 4 milliónir krónur, sigur Jan Allan Muller.

Injector fer á Fish Fair stevnuni at hava lemmar av slagnum Stealth F15 standandi uttanfyri sjálva framsýningina. Talan er um flótitrolslemmar, sonevndar profillemmar.

- Hesar lemmarnar skal Fagraberg hava, sigur Jan Allan Müller.

**Framleiðsla í Kina í tonsum fram til dagsdato: 500 tons (2007)**
**Framleiðsla í Litava: Umleið 400 tons higartil í 2007**
**Við framleiðsluni í Danmark nærkast framleiðslan hjá Injector av stálvørum og lemmum teimum 1000 tonsunum, tá mai mánaði er farin afturum**

# Ætla at veksa uppaftur meira

**Tað eru nú trý ár síðani at Samskip setti fótin á føroyska jørð. Síðani hava teir alsamt vaksið um virksemið, og teir hava ongar ætlanir um at steðga á**

**FLUTNINGUR**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Samskip er eitt av teimum nýggju skipafeløgunum. Tað varð stovnað í 1990 og hevur síðani bygt seg upp til eitt felag við einum heimsumfatandi flutningsneti.

Annars siglur Samskip á egnum kjøli í Norðurevropa og felagið hevur ment seg til at vera størsti "Short Sea" veitari í Evropa.

- Til at røkja heimsumfatandi flutningsnetið, hevur Samskip skrivstovur og samstarvsfelagar í Íslandi, Stóra Bretlandi, á meginlandinum í Evropa, Miðeystri, í Eysturevropa, í Russlandi, Norðurlondum, Baltalondum, USA, Kanada, Suðuramerika og Asia, sigur Joel undir Leitinum, stjóri í Samskipum í Føroyum.

Sostatt hevur Samskip skrivstovur í 20 londum í at kalla øllum heimspørtum, sum syrgir fyri, at vørurnar koma á rætta stað til røttu tíð.

Fyri nøkrum árum síðani fór Samskip eisini at hugsa um føroyska markndin og úrsitið var, at felagið settist niður í Føroyum, fyri trimum árum síðani.

Men hóast teir ikki hava virkað í Føroyum serliga leingi, hevur Samskip spent seg út og hevur ment seg alla tíðina.

- Men vit ætla at halda á at mennast og til at gerast tað flutningsfelagið, sum viðskiftafólk halda, tænir teimum best og sum tey tí helst vilja brúka, sigur Joel undir Leitinum.

Í fyrstuni sigldi Samskip aðruhvørja viku upp á Klaksvík, men skjótt vaks virksemið til at felagið nú sigla einaferð um vikuna til og úr Føroyum.

- Fyri hálvumtriðja ári síðani fór Samskip at sigla hvørja viku upp á Kollafjørð sum nú er høvuðshavn, bæði úr Føroyum og til Føroya.



*Á Samskipum eru tey serliga sterk í at flyta fiskavørur úr Føroyum til keyparar kring allan heim*

Fyri at styrkja seg og fáa eitt bein afturat at standa á, hevur Samskip eisini keypt stóru frystigoymsluna, sum Kloosterboer átti í Kollafirði.

- Tað hevur styrkt felagið, tí tað gevur okkum møguleika at geva viðskiftafólki eina heildartænastu, serliga viðvíkjandi fiskaflutningi, har vit kunnu landa og lossa trolarar og triðjalands skip í Kollafirði, legga vøruna á frystigoymsluna og avskipa hana víðari og senda hana um allan heim.

- Síðani vit vit byrjaðu í Føroyum, hava vit vaksið munandi um okkara virksemi her. Og vit ætla framvegis at økja um okkara virksemi í Føroyum, tí her síggja vit nógvar møguleikar at mennast.

## Serliga styrkin er fiskurin

Samskip flytir so at siga allar vørur bæði sum bingjuflutning og við bulkbátum, men serliga sterkir eru teir í at flyta fiskavørur av ymsum slagi av landinum, tað verið seg feskan fisk, saltfisk, frystan fisk og turrar fiskavørur.

Til Føroya er vøruflutningurin meiri fjølbroyttir, tí har er talan um allan vanligan flutning.

Úr Føroyum siglur Samskip til Immingham í Onglandi og síðani til Rotterdam.

- Rotterdam er høvuðshavnin og haðani ganga træðrir út í alla verðina so tað gevur okkum ein serligan møguleika at senda vørur víðari út í heim. Tí er tað ein stórur fyrimunur fyri okkara viðskiftafólk, at vit sigla til Rotterdam, sigur Joel undir Leitinum.

Til Føroyar siglur Samskip úr Reykjavík og av Reyðafirði í Íslandi, úr Immingham í Onglandi, úr Rotterdam í Niðurlondum, úr Cuxhaven í Týsklandi úr Varberg í Svøríki og úr Århus í Danmark. Báturin fer úr Århus fríggjakvøld, er í Havn klokkan fimm mánamorgun, so viðskiftafólk okkara úr Føroyum hava vørurnar, tá ið arbeiðsvikan byrjar.

Á Fish Fair er Samskip eisini umboðað og á básinum fara tey at hitta og kunna viðskiftafólk og komandi viðskiftafólk.

- Vit hava alla tíðina eitt leypandi samskifti við okkara viðskiftafólk, tí tað halda vit hevur stóran týdning fyri at kunna menna tær tænatur, tey vilja hava, sigur stjórin hjá Samskip í Føroyum.